


# Loyvi latið Statoil at bora Súlan/Stelkur

Deil:

Jan Müller

29.06.2014 - 23:17

Oljan.fo

Við heimild í kolvetnislógini hevur Jarðfeingi  givið Statoil Faroes loyvi at fara undir boring av brunninum 6104/25-1, eisini nevndur Súlan/Stelkur.

Boringin verður gjørd av boripallinum West Hercules, ið kemur á boristaðið í vikuskiftinum.

Brunnurin verður boraður í loyvi nr. 008, har Statoil er fyristøðufelag. Hinir loyvishavararnir eru  OMV og DONG Energy.

Knattstøðan er 61° 11´ 20.585” N og 04° 02´21.052” W.

Kelda: www.jardfeingi.fo